

## ENI boriloyvi á landgrunninum

Jarðfeingi lat í gjár italska oljufelagnum ENI Denmark BV góðkenning at fara undir leitiboring eftir kolvetnum í loyvisøki 005 á føroyska landgrunninum. ENI Denmark BV er fyristøðufelag og umboðar 55% av loyvinum. Hinir loyvishavararnir eru OMV (Faroe Islands) Exploration GmbH, Føroya Kolvetni P/F og Cieco Exploration and Production (UK) Limited. Boripallurin West Phoenix, sum norska felagið Seadrill eigur, skal bora brunnin og verður væntandi á føroyska boristaðnum í seinnu helvt av mai. Loyvisøkið liggur í ein landsynning úr Føroyum.

## Rókur og Lerkur landa

Partrolararnir Rókur og Lerkur hava landað umleið 180.000 pund av upsa í Saltangará í dag. Garnaskipið Oknin er eisini inni við 18.000 pundum av svartkalva. Mánadagin koma Polarhav og Stjørnan inn at landa. Teir eru umleið hálvfullir av upsa. Av seks skipum, sum plaga at veiða gulllaks í vertíðini, eru Eysturbúgvin og Vesturbúgvin nú á øðrum túri – og Vestmenningur og Fram landa í løtuni fyrstu gulllaksalastina í Peter Head í Skotlandi.

# Løgreglan eftirlýsir bilførara

**EFTIRLÝSING** Politiið sóknast eftir einum bilførara, sum rýmdi frá einum ferðsluóhappi Norðuri í Sundum í Kollafirði fyri góðum tveimum vikum síðani

Rólant Waag Dam

Mikukvøldið 31. mars klokkan 20 minuttir í átta, kundi tað enda rættiliga galið, tá tveir bilar møttu hvørjum øðrum Norðuri í Sundum í Kollafirði.

Ein bilur er á veg norð eftir og møtir einum mótkoyrandi bili. Brádliga verður hesin mótkoyrandi bilurin yvirháluður, soleiðis báðar síðurnar av vegnum eru tiknir.

Bilførarin í norðurkoyrandi bilinum hevur tveir møguleikar. Annar er at renna frontalt inn í annan av hinum bilinum, tað kann spæla heilt vanlukkuliga av, har fleiri fólk eisini verða partur av óhappinum.

Hin møguleikin er at renna sín bil út av vegnum og vóna tað besta. Bilførarin velur seinnu loysnina og fer buldrandi gjøgnum bøin einar 75 metrar, áðrenn bilurin steðgar og er fullkomiliga vrak.

Hin bilførarin, sum yvirháladi og sostatt tvingaði henda bilin út av vegnum, fer buldrandi suður eftir uttan at steðga. Tveir vikur seinni hevur hann framvegis ikki gjørt vart við seg, so nú heitir løgreglan á fólk, sum hava sæð óhappið ella vita okkurt, um at gera vart við seg, soleiðis at løgreglan fær loyst málið.

– Ella kanska viðkomandi sjálvur ringir til okkara, vóna tey á løgreglustøðini í Havn.

*rolant@sosialurin.fo*

**Kanska viðkomandi sjálvur ringir til okkara**

POLITIIÐ




*Bilførari, sum yvirháladi, noyddi ein annan bil út av vegnum. Bilførarin verður nú eftirlýstur*

## Skjótari internet gevur milliardavøkstur

Útrokningar vísa, at skjótari internet er beina leiðin til búskaparligan vøkstur. Hetta vísir ein nýggj kanning, sum ráðgevingarfyritøkan Copenhagen Economics leggur fram fyri donsku stjórnina í dag. Kanningin vísir, at um ferðin á breiðbandi verður átta ferður skjótari enn nú, gevur tað ein vøksur upp á 114 milliardir krónur, ella fimm prosent av BTÚ.

Fyritøkurnar verða alsamt meira internationalar, og tað setir krøv til útbúgvingarstøðið og digitala samferðslukervið.

Kanningin vísir, at við øktari ferð á breiðbandinum verður arbeiðstíðin gagnnýtt betri. Í staðin fyri at ferðast millum støð, ber til at avgreiða uppgávur yvir netið og á videoráðstevnum.

Økti effektivitet-urin hevur við sær økta framleiðslu.

At flyta ferðsluna av vegunum og yvir á netið er eisini ein vinningur fyri umhvørvið.

Atfinnarar vísa á, at Danmark hevur í alt ov lítlan mun ment seg á hesum øki, og tí singlar landið í løtuni niður eftir listanum yvir heimsins ríkastu lond. Í dag liggur Danmark á einum 16. plássi yvir miðalferðina á breiðbandinum.

*rigmor@sosialurin.fo*

# Roykurin kom uttaneftir



Randi Jacobsen

Nakað eftir klokkan 16 hósdagin merktu fólk í Handilskjarnanum í Havn royk í húsinum, og boð vórðu send eftir sløkkiliðinum.

Nokkso nógvur roykur var í kjallaranum og eitt sindur aðrastaðni eisini, men eldur var eingin at síggja.

Meðan leitað varð eftir kelduni til roykin, vórðu starvsfólkini í húsinum biðin um at fara út, og tey fóru út við teldum og øðum útbúnaði.

Umsíðir fann sløkkiliðið orsøkina til tann nógva roykin.

Har var eitt luftskiftisrør, sum skuldu blása fríska luft inn, men beint við, har rørið gekk út av húsunum, lá ein rúgva av sigarettstubbum á eini rist.

– Vit komu til tað úrslit, at tað kundi ikki vera onnur orsøk til roykin, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsleiðari í Tórshavnar kommunu.

*randi@sosialurin.fo*